## Siumut sett til viks

Fyri fyrstu ferð í 19 ár er Siumut-flokkurin endaður í andstøðu í býráðnum í Nuuk. Siumut gjørdist størsti flokkur á kommunuvalinum seinasta vikuskiftið, men Inuit Ataqatigiit og Demokratarnir eru gingir saman í meiriluta. Formaðurin hjá Siumut í Nuuk, Kim Godtfredsen, sigur við KNR, at hinir báðir flokkarnir hava samstarvað í Landstinginum, og at teir høvdu avtalað at samstarva í Nuuk longu fyri kommunuvalið.



*Fyri fyrstu ferð í 19 ár eru Siumut í andstøðu í Nuuk*
*Mynd: KNR)*



*Farið verður nú undir at leggja mold á, so klárt verður at leggja grasrullurnar á stadion til frælsan ítrótt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stadion li Ólavsøku

**1. juli verður rennibreytin klár at taka í nýtslu á nýggja stadion til frælsan ítrótt, sum Havnar kommuna letur gera við Sundsvegin. Eitt ár seinni enn upprunaliga ætlað**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Til Ólasvsøku eiga føroyingar eitt nýtt, flott stadion til frælsan ítrótt.

Byggingin er nógv seinkað, men sambært Rúna Abrahamsen frá MAP arkitektunum, sum stendur fyri arbeiðinum, kemst hetta í stóran mun av, at undirlagið til rennibreytina bert kann leggjast á summarhálvárið, í tað má vera turt, tá hetta verður lagt á.

- Tá vit ikki náddu tað áðren september mánaði var komin, máttu vit bara sanna, at vit ikki fingu gjørt nakað við renniundirlagið fyrr enn um hálvan mai í ár, sigur Rúni Abrahamsen.

Hetta arbeiðið skal verða liðugt 1. juli, meðan restin so skal verða klár at taka í nýtslu til Ólavsøku.

- Talan er um eitt fullfíggjað stadion til frælsan ítrótt. Har verða fasilitetir til kúluvarp, klingruvarp, hamar-

# Ovurkátir ungdómar

**Fleiri av teimum, sum koyrdu eftir Hvítanesvegnum í morgun, mundu gerast ov sein til arbeiðis. Ovurkátir ungdómar hugnaðu sær við at órógva ferðsluna**

SKÚLAUNGDÓMUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*






*Ungdómarnir hugnaðu sær, men gjørdu einki herverk. Løgreglan, sum var komin á staðið, fór tí skjótt avstað aftur*

Eini 70 ungdómar, sum ganga seinasta árið í Hoydølum, hugnaðu sær í morgun við at tarna ferðsluni, ið koyrdi eftir Hvítanesvegnum.

Orsøkin til hetta ovurkæti er, at tey nú bert hava 20 dagar eftir at ganga í skúla, áðrenn lesifrítíðin byrjar.

Tey høvdu gjørt seg út við ballónum og blómum, sum tey góvu bilunum, sum koyrdu framvið, men skjótt var hetta uppi, og so royttu tey sær hoysoppar at tveita á bilarnar.

Løgreglan kom á staðið, men ungdómarnir gjørdu einki herverk, teir vóru bert kátir. So løgreglumenninir uppgóvu at gera nakað, og fóru skjótt av staðnum aftur.

Tað skapti seligan jubil, tá lastbilar og bussar, sum koyrdu framvið, togaðu í lúðurin, men alt fór friðarliga fram.

Ungdómarnir sóu út til at hava hugnað sær alla náttina, og teir vóru ikki bangnir fyri at siga, at teir beint út skulkaðu í dag